gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Einsamallur í Kúrgjógv

**Í seinastu viku vóru menn og sleptu einum veðri í Kúrgjógv innanvert Nevið í Eysturoy. Kappróðrarfelagið NSÍ eigur veðrin, sum skal seljast á uppboði í heyst, um hann kemur aftur**



*Hesir báðir eru vist teir fyrstu síðan Boarakríggið, sum umframt havhestarnar hava verið í Kúrgjógv*

SEYÐAHALD
*Orð og myndir*
*Edvard Joensen*

**í Glyvrahaga:** Tað gongur ein einsamallur veðrur í eini gjógv innanvert Nevið eystantil. Kappróðrarfelagið NSÍ eigur seyðin, sum ætlandi skal seljast á uppboðssølu í heyst.

Vit hittast á Lambareiði, sum avtalað er. Tá blaðmaðurin kemur, er bara ein maður komin. Tað er borgarstjórin í Runavík, sum er sera virkin í kappróðrarfelagnum. Sum skilst er tað hann, sum hevur lagt til, og hann stendur nú og kveilar eina línu, sum skal nýtast á ferðini.

Einir átta mans við fleiri bilum koma so við og við. Ein bilur er ein lítil lastvognur hjá Jørgeni bónda á Glyvrum, sum hevur ein rættiliga fittan veðr standandi bundnan í lastini. Tað sita tríggir mans í bilinum. Hava bond og hælir við, umframt eina sleggju, sum brúkast skal at sláa hælirnar fastar. So okkurt er sum bendir á, at sígast skal.

– Ja, hvør skuldi trúð tí, at glyvramenn fóru við skoraseyði, heldur onkur fyri. Tað man ikki vera hent, tað fólk í dag minnast, halda teir.

Meðan vit bíða eftir seinastu monnunum, kemur ein størri lastbilur eftir Lambareiði. Men hann koyrir framvið oman móti lendingini í Lamba. Við einum gulum báti í lastini. Tað er tíggjumannafarið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ, tann kendi Eysturringur, sum fer at venja á Lambavík. Tað er okkurt við ættini á Skálafirði, siga teir staðkendu.

Tá allir eru møttir, fara vit avstað. Hava sett flestu bilarnar eftir. Halda frægast vera at fylgjast. Vit eru einir fýra í bóndans bili saman við veðrinum, sum øll ferðin snýr seg um.

## Harur og havhestur

Bóndin er tíðindafróður og sigur frá staðarnøvnum og tilburðum, sum verið hava, meðan vit koyra eftir vegnum niðan av Lambareiði út í Glyvradal.

Vit koma niðan á og koyra gjøgnum risastóra grótbrotið. Her, veit bóndin at siga, eru rættiliga nógva harur, hví tað so man vera. Umframt havhestin sjálvandi, sum jú er allastaðni.

Vit koyra, til vegurin endar nakað uttan fyri smoltstøðina hjá Bakkamonnunum, har bóndin hevur eitt frálíkt hús. Fara úr bilunum og fara beinanveg til gongu niðan brekkuna.

Veðrið er frálíkt. hóast okkurt ælið sást standa rundan um Múlatind, áðrenn vit fóru av Lambareiði. Men sum ættin er, tykist tað ikki røkka út eftir Lambavík. Sólin skínur, og ikki er so kalt, sum tað tyktist longri norðuri á landinum, har kavi lá oman av fjøllunum.

Mjóvanes liggur í sólskini. Eini tvey skip eru á ferð beint sunnanfyri, og á Lambavík eru ungu menninir komnir væl út undir Líðina í Eysturoyingi.

Vit ganga niðan undir Klubbarnar og út eftir Skøvunum, sum teir staðkendu greiða frá. Ein lógv hoyrist nakað burturi, og onkur mási umframt einir tveir ravnar eru at síggja. Annars er lítið av fugli her úti.

Menn tosa og eru fróir. Hava hug at skemta og siga frá stuttligum hendingum, teimum hava verið fyri á fjalli her úti. Tað skilst, at her eru menn, sum vanir eru at ganga á fjall hjá glyvrabóndanum.

Tað er ikki langt at ganga. Kanska ein hálvur tími ella so, og rímilia lætt eisini. Veðrurin gongur væl og darvar einki gongdini. Hann grunar nevyvan, at hann verður sleptur í feitilendi, har eingin hevur verið, tað núlivandi fólk minnist. Og at hann síðan skal ganga einsamallur har millum havhestarnar restina av sumrinum.

Kúrgjógv liggur á markinum millum Glyvrahagan og Toftahagan innanvert Nevið eystantil. Vit ganga, til vit koma at hegninum, sum gongur í gjónna. Fara so oman við gjónni, til vit koma at einum skarði, har menn halda, at farast skal niður. Hugt verður útav, men har er soleiðis vorðið, at tað sæst ikki niður í gjónna. Fara tí eitt sindur longri oman, og finna annað skarð, har væl sæst niður, og hildið verður tí, at her man niðurgongdin vera, hóast teir staðkendu høvdu betri álit á tí fyrra skarðinum.

## Millum havhestar og sýrur

Einki er at bíða við. Gjørt verður klárt at lesa ein mann niður i gjónna at taka í móti veðrinum. Hælir verða slignir niður, og línan gjørd á mannin, sum síðan fer um upsina. Hann ruddar fyri sær leyst grót og koyrir havhestarnar, sum liggja á vegnum, á flog. Hevur einki álit á spýggjuni soleiðis.

Tað gongur upp á stás, og brátt stendur hann í flóttinum niðri í gjónni. Har er rímiliga gott pláss, sigur hann frá. Heldur ongan iva vera um, at tað er eitt seyðafrælsi, hóast sýruleggirnir tykjast vera fleiri enn grasstráini.

Onkur heldur skemtandi fyri í erva, at eru so nógvar sýrur, kann veðrurin vænta sær eitt súrt lív í summar.

Og skemtingarsamir eru menn. Tá maðurin, sum niður er farin, er komin at standa, ger onkur vart við, at hann er jú deildarleiðari í bankanum, so nú er møguleikin góður at fáa lækka rentuna, um hann bara fær at vita, at hann ikki sleppur uppaftur.

Hann hyggur seg um har niðri, meðan teir í erva fella veðrin og gera klárt at lesa hann niður. Og maðurin í gjónni heldur seg síggja, at tað fyrra skarðið, vit vóru hjá, mundi vera rætta niðurgongdin, og at hann ætlar sær upp aftur tann vegin. Heldur at gongt er líka undir upsina.

So verður veðrurin latin útav, og hann kemur niður í øllum góðum. Verður loystur úr og stendur so og bínir har eina løtu. Líkasum fyri at summa seg, nú hann saman við bankaleiðaranum er komin í gjónna at gera havhestunum selskap. Onkur vil vera við, at teir eru teir fyrstu, sum hava verið har niðri í hvussu er hesu megin Boarakríggið.

Tað gongur upp á stás hjá sigmanninum at koma upp aftur tann vegin, hann sjálvur helt vera tann léttara. Men hann metir tó, at rætt var at fara niður, har hann var farin. So tá farast skal aftur eftir veðrinum í heyst, verður gjørt upp á sama máta, gera menn av.

Eina løtu verður sitið og práta her úti, áðrenn farið verður heimaftur. Ein av monnunum hevur kaffi við í ryggsekkinum, og allir fáa upp í munnin. Veðrurin tykist eisini hava summað seg og er farin at eta, so ikki man standa heilt illa til við sýrunum kortini.

Vit ganga heim aftur gjøgnum hjallan í neðra og koma at húsinum hjá bóndanum. Eysturoyingur er enn á Lambavík. Nú er hann á veg inn eftir víkini aftur.

Inni hjá bóndanum stendur heitur súpanarpottur og bíðar, og lagið er bara heilt gott, tá súpanin er komin niður um, og vit fara aftur í bilarnar og koyra oman á Lambareiði, haðani hvør fer í sínum bili aftur at húsum.



*Veðrurin varð feldur og loraður niður í gjónna, har hann skal ganga einsamallur, til hann verður tikin aftur í heyst*

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur
Nr. 114 • týsdagur • 19. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Illa viðfarin í Herfølge:

**Jákup klamsar við hurðini**



Síða 20-21

B68-Lokeren 2-4 (2-2)

# Luftin fór úr toftamonnum

*Frøin var stór á toftamonnum, tá Súni Fríði hevði lagt teir á odda, men seinni gekk luftin tó undan*
*Mynd: Jonhard Hammer*




**Eftir B68 leiðslu í 1. hálvleiki var síðstu løtuna so at siga bara spæl til eitt mál**

INTERTOTO
*Jóannes Hansen*

B68 fer í morgin til Belgia, har teir leygardagin skulu spæla í Intertoto. Neyvan nakar mundi frammanundan rokna við, at føroyska liðið fór at hava nakran møguleika at sleppa víðari í kappingini. Og eftir 4–2 tapið á heimavølli eru allar vónir um framhaldandi altjóða fótbólt burtur.

Fyrra umfarið á Svangaskarði var heilt hugaligt. Eftir B68 kiks í uppspælinum fingu gestirnir ókeypis møguleika. Miðverjan hjá toftamonnum var á veg fram, tá Mputu Bandu fekk stungið fram ímillum og gjørdist púra leysur við Kjartani Nesá, sum aftur hesa ferð var í málinum.

Men B68 svaraði aftur. Marcelli Marcellino stútaði til 1–1, eftir at John Heri Dam hevði sent innfyri úr høgru. Hann og Arnold Joensen høvdu ornað stutt horna. Tá var ein hálvur tími farin, og sjey minuttir seinni gjørdist tað rættuliga stuttligt eftir skjótt mótálop. Fróði Benjaminsen, sum var staddur aftarlaga á vøllinum, sendi Arnold Joensen avstað í høgru, verjan tóktist hava tak á innlegginum, men Súni Fríði Johannesen kom ímillum, og so var 2–1 til B68.

## Veikleikarnir

Lokeren javnaði í síðsta álopinum undan steðginum. Eftir umkast í høgru sendu teir tvørturum, og har fekk Karim Elbodmossi alt ov gott pláss, áðrenn hann við vinstra beini sendi flatt í handara síðunetið.

Lokeren hevði heilt lítið av besta fólkinum við, og spælararnir vóru bara fimtan í tali. Kekkiski landsliðsmálverjin hevði fingið frí, og tað høvdu íslendsku spælararnir eisini. Talan var um ungt og óroynt lið, men sum seinna umfarið leið, sást alt betur, at teir vóru væl betri fyri enn B68. Síðstu tjúgu minuttirnar var eingin luft eftir í toftamonnunum, og tapið kundi væl havt verið størri enn 4–2. Eftiransingarnar hjá heimaliðnum dragnaðu, og gestirnir vóru ofta í yvirtalsstøðum, tá teir fóru í skjót mótálop.

Triðja málið fingu teir eftir langt innlegg úr høgru. Næstan av baklinjuni stútaði Elbodmossi í handara síðunetið. Hetta var miðskeiðis í 2. hálvleiki, og fýra minuttir undan leikloki var tað miðvallarin Okitankoyi Kimoto, sum gjørdi hevði lætt spæl, eftir at tað enn eina ferð var kiksað í B68 uppspælinum.

**INTERTOTO**
**B68–Lokeren, Belgia**
**2–4 (2–2)**

Á Svangaskarði leygardagin 16. juni 2001, kl. 17.00
300 áskoðarar
Dómaratrio úr Ukreina:
4. dómari: Jens Albert Simonsen
UEFA umboðsmaður úr Ungarn:
0–1:
Imbungu Mputu Bandu 10.
1–1:
Marcello Marcellino 30.
1–2:
Súni Fríði Johannesen 37.
2–2:
Karim Elbodmossi 45.
2–3:
Karim Elbodmossi 64.
2–4:
Okitankoyi Kimoto 86.

**B68:** 1. Kjartan Nesá – 21. Jan C. Dam, 4. Hans Fróði Hansen, 3. Jákup Eli Olsen – 11. Arnold Joensen, 7. Øssur Hansen, liðformaður, 16. Jan Petersen (19. Jann Ingi Petersen, 46.), 10. Fróði Benjaminsen, 6. John Heri Dam – 9. Marcello Marcellino, 20. Súni Fríði Johannesen

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 12. Magnus Poulsen, 5. Marlon Jorge, 8. Mortan Hansen, 17. Messias Pereira, 18. Oleif Joensen

Venjari: Jóannes Jakobsen
Liðleiðari: Jógvan Højgaard

**Lokeren:** 12. Frank Symons – 2. Michaël van Hoey, 3. Stefaan Staeliens, 13. Andy Vande Sorbel, 5. Stefan van Dender, liðformaður – 7. Okitankoyi Kimoto, 14. Dennis Moerenhout (15. Bart Desmet, 84.), 6. Camille Muzinga (17. Thomas Ruys, 87.), 8. Davy de Beule – 9. Imbungu Mputu Bandu (10. Rigo Bwayi Kidoda, 79.), 11. Karim Elbodmossi

Á beinkinum uttan at verða skiftur inn: 18. Ortwin Helderwert

Venjari: Paul Put

Gult kort: Stefan van Dender 8.